# GERÐABÓK

**Dato:** **17. februar 2005**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:** **54/05-70/05**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jan Christiansen
Jógvan Arge
Katrin Dahl Jakobsen
Sjúrður Olsen
Leivur Hansen
Bjarti Mohr
Hildur Eyðunsdóttir
Høgni Mikkelsen
Elin Lindenskov
Annika Olsen
Marin Katrina Frýdal
Beate L. Samuelsen
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**

**LUTTÓK EISINI:**

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

## MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 18.00:

Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.

**55/05** 200500038

**Mál beind í nevndir.**

**Býráðið 17. mars 2005:** Tikið til eftirtektar.

**56/05** 200402757

**Frábýti av grundstykki á Sundi**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Fyri mongun árum síðan kom fram, í samband við avtalur inni á Sundi, at frábýtast skuldi grundstykki til sethús, fjós og úthús. Hetta varð seinni staðfest við úrskurði frá náttúrufriðingarmyndugleikunum og í tilsøgn ráðsins til Tórshavnar kommunu um keyp av lendi uppi á Sundi.

Einasta korttilfar, sum sæst í málinum, er eitt kortskjal frá mars 1980, sum byggi- og býarskipanardeildin hevur gjørt.

Síðan eru stórar broytingar hendar uppi á Sundi, sum hava við sær, at tað tykist órímiligt at halda fast við hetta kortið.

Serligu broytingarnar í hesum sambandi er, at nýggj vegaføring er gjørd oman til bryggjuna og á bryggjuni, sum m.a. hevur við sær, at gamli ferðslurætturin vestan fyri húsini oman á bryggjuna, matr.nr. 2, er óneyðugur. Hesin ferðslurætturin hevði helst við sær, at hjallurin kom ikki at liggja innanfyri á grundstykkinum, tá kortið varð gjørt.

Tað er tí rímiligt, at áin verður mark vestureftir. Eystan fyri húsini er so mikið lítið pláss eftir millum veg og hús, at tað er mest rímiligt at lata stykkið ganga til vegin.

Grundstykkið verður umleið 3.200 m².

Vísandi til hesar viðmerkingar er sett nýtt mark á eitt nýtt kortskjal, sum tykist nógv rímiligari enn tað gamla frá 1980.

Tí verður mælt til frá Føroya Jarðarráð at taka undir við nýggja uppskotinum, soleiðis at málið uppi á Sundi kann avgreiðast.

**Tilmæli:**
Býararkiterturin mælir til, at tað nýggja kortskjalið, daterað 20. desember 2004, verður samtykt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. februar 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Harumframt samtykt at beina málið í kaldbaksnevndina.

**Kaldbaksnevndin 16. februar 2005:** Mælt verður til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 17. mars 2005:**

Kl. 17.20 Fundurin varð niðurlagdur í 2 minuttir.

Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá Jan Christiansen um at beina málið í fíggjarnevndina, ið fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen, Jan Christiansen, Bjarti Mohr og Annika Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Síðan varð atkvøtt um tilmælið hjá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Greiddu ikki atkvøðu: Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen, Jan Christiansen, Bjarti Mohr og Annika Olsen.

**57/05** **200500127**

**Broyting av byggisamtykt fyri økið á Sundi.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Ásetingar fyri umráðispart B9 í 3. grundumráði eru galdandi fyri alt økið á Sundi, sum sostatt er avlagt til vinnuendamál.

Við verandi byggisamtykt er økið lagt av til vinnu, ið beinleiðis ella óbeinleiðis eru útflutningsfremjandi. Hetta avmarkar møguleikarnar at brúka økið.

Tá økið er avlagt til vinnuøki, kunnu vinnur, sum ikki hava nakað samband við skipaferðslu og skiparakstur, eisini liggja á økinum.

Hetta viðførir, um hugt verður eftir kommununi og havnini sum ein heild, at vinnur, sum hava tørv á at liggja á havnaøkinum, møguliga mugu leggjast á annað stað, tí havnaøkið verður brúkt til vinnuendamál, sum ikki hava tørv á at liggja har.

Kommunan leigar part av tí ovara økinum til eitt asfaltverk.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at leggja hesi øki av til havnaøki:

a) fram við sjóvarmálanum frá nakað innan fyri oljubryggjuna og fram við markinum til grundøkið hjá SEV.
b) alt økið niðan fyri vegin á ídnaðarøkinum eystur til Sundsá.
c) alt økið frá Sundsá og eystureftir. (J. nr. 200500127 /1)

Økið eigur at verða brúkt til havnarakstur og goymslur í sambandi við skipaferðslu og til virksemi, ið hevur serliga stóran tørv á sjóvegis flutningi.

**Havnanevndin 17. januar 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina um kaldbaksnevndina.

**Kaldbaksnevndin 16. februar 2005:** Mælt verður til at taka undir við tilmælinum frá havnameistaranum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at byggisamtyktin verður broytt sambært kortskjali.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. februar 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býararkitektinum, tó soleiðis at matrikulin við bóndagarðin verður verandi B9-øki.

**Býráðið 17. mars 2005:** Einmælt samtykt.

**58/05** **200500520**

**Broyting av reglugerð fyri Barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráðs.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í grein 5 stendur:

"Fimmmannanevnd ætlar um og ger av, hvør skal fáa virðislønina.

Limir í fimmmannanevndini eru: barnabókavørðurin á Býarbókasavninum í Tórshavn, sum eisini er skrivari í nevndini, ein limur valdur av Felagslærararáðnum við kommunalu skúlarnar í Tórshavn, tveir limir valdir av Tórshavnar býráð og formaðurin í mentamálanevnd Tórshavnar býráðs, sum er formaður. Tað hvílir á barnabókavørðinum at kalla saman til fundar í hesi nevnd."

Felagslærararáðið við kommunalu skúlarnar í Tórshavn er avtikið

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at broyta § 5 soleiðis, at ístaðin, at ein limur verður valdur av Felagslærararáðnum, verður ein limur valdur av skúlabókavørðunum við kommunalu skúlarnar í Tórshavnar kommunu.

**Mentamálanevndin 2. mars 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 17. mars 2005:** Einmælt samtykt.

**59/05** **200401759**

**Uppskot til burturveiting av spillvatni frá Vestaru vág - Reinsan av Vestaru vág)**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Umsitingin hevur latið gera uppskot um burturveiting av spillvatni frá Vestaru vág saman við sp/f Martin Leo.

Arbeiðið er uppsett at verða gjørt í fleiri stigum. Fyrsta stig, at fáa kloakkina frá Tórsgøtu og út í Bakka, er liðugt. Hetta spillvatnið verður pumpað niðan gjøgnum Mylnugøtu niðan í Havnará.

Kloakkin gjøgnum Gríms Kambans gøtu er eisini løgd. Henda kloakk skal føra spillvatnið frá uttara parti av Rættará í pumpubrunn, ið verður lagdur á Skálatrøð. Henda leiðing kemur at hava samband við kloakkina í Mylnugøtu.

Ætlanin er at fara undir Stig 1 A (nevnt í uppskotinum). Hetta uppskot fevnir um høvuðskloakkina frá Tróndargøtu til Havnará uml 160 m.

Sp/f Martin Leo hevur gjørt projektið liðugt, og er hetta klárt til útbjóðingar.

Mett verður, at skilabest er at bjóða hetta arbeiðið út í innbodnari lisitatión, og at farið verður undir arbeiðið í januar 2005, har hesir arbeiðstakarar verða bodnir við vísandi til, at kommunan hevur góðar royndir at lata hesar gera slík kloakkarbeiði:

Robbie Brockie
Karl Patursson
Andrias Berg
Jóannes Hellisdal

Arbeiðið eigur at bjóðast út soleiðis, at arbeiðstíðin verður so stutt sum møguligt, so ferðslan verður tarnað sum minst.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við uppskotinum og at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión, soleiðis at úrslitið av lisitatiónini kann leggjast fyri nevndina til støðutakan í ár.

**Tekniska nevnd 28. september 2004:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum, og at arbeiðið verður skipað soleiðis, at ferðslan verður tarnað sum minst.

**Ískoyti:**
Endaligt projekt er gjørt hjá sp/f Martin Leo, og er kostnaðarmeting gjørd yvir arbeiðið. Samlaði fíggjartørvurin er 3,2 mió. kr. (Sí annars notat j.nr. 200401759/4).

Greitt verður frá fyriliggjandi projekti og hvussu arbeiðið verður lagt til rættis við atliti til at ferðslan verður tarnað sum minst.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión í februar, so farast kann undir arbeiðið í mars 2005.

**Tekniska nevnd 3. februar 2005:** Nevndin samtykti at halda fast við samtyktina frá 28. september 2004 og at bjóða arbeiðið út beinanvegin.

**Ískoyti:**
Lisitatión var hildin tann 24. februar 2005, kl. 11.00, og inn komu 3 boð. Greitt verður frá úrslitinum av lisitatiónini, og tilmæli verður lagt fram á fundinum.

**Tekniska nevnd 3. mars 2005:** Eftir tilmæli frá býarverkfrøðinginum samtykti nevndin at taka av lægsta tilboðnum frá sp/f Plan áljóðandi kr. 1.191.435,00,

umframt at játta útreiðslur til projekt, eftirlit og óvæntað, soleiðis at samlaða upphæddin verður áljóðandi kr. 1.712.355,00 og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 9. mars 2005:** Boði Haraldson greiddi frá málinum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 1.800.000,00 av íløgum 2005.

**Býráðið 17. mars 2005:** Einmælt samtykt.

**60/05** **200500536 (sí mál nr. 200401989)**

**Ábøtur á gongubreytir í miðbýnum**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Víst verður til mál nr. 200401989, har tekniska nevnd tann 3. februar 2005 samtykti, at umsitingin fær tilboð uppá at gera gongubreytir á Miðbýurin-Tinghúsvegur, Miðbýurin-Áarvegur, oman Pisuvarða-Kongagøta, Tórsgøta-Sverrisgøta beinanvegin.

**Ískoyti:**
Lisitatión var hildin tann 28. februar 2005. Býarverkfrøðingurin kemur við tilmæli til fundin.

**Tekniska nevnd 3. mars 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum at taka av tilboðnum frá sp/f J. & B. Kyster uppá arbeiðið at gera gongubreytir á

1. Áarvegnumr
2. Tinghúsvegnum
3. Sverrisgøtu
4. Niels Finsens gøtu/Kongagøta-Sjúrðargøtu
5. Niels Finsens gøtu/Sjúrðargøtu-undir Pisuvarða
6. Hoydalsvegnum/undir Pisuvarða/oman Pisuvarða
7. Vegamótinum Tórsgøtu-Sverrisgøtu

áljóðandi kr. 2.006.380,00 ella íalt kr. 2.400.000,00 íroknað 6,25% MVG og ókent.

Nevndin samtykti eisini at taka undir við at gera gongubreytirnar í J. C. Svabos gøtu við Landssjúkrahúsið, sum eru mettar at kosta 300.000,00 kr. Sostatt gerst

samlaði kostnaðurin 2,7 mió. kr. Av hesi upphædd verða 2 mió. kr. fíggjaðar av rakstri kt. 11-4115.

Nevndin mælir býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta írestandi kr. 700.000,00 av íløgum 2005.

**Fíggjarnevndin 9. mars 2005:** Boði Haraldson greiddi frá málinum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 700.000,00 av íløgum 2005.

**Býráðið 17. mars 2005:** Einmælt samtykt.

**61/05** **200400196**

**Viðvíkjandi upptøkureglunum til dagstovnarnar og kommunalu dagrøktina í Tórshavnar kommunu**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Síðani 1995 hevur kommunan víst til kunngerð um gjaldsreglur frá Almanna-stovuni, tá foreldur hava verið í eftirstøðu. Men tá kommunan yvirtók dagstovnarnar á sumri 2000, fóru tær reglurnar úr gildi.

Almanna- og heilsumálaráðið er í fer við at endurskoða løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt, har eisini spurningur um eftirstøðu av foreldragjaldi verður viðgjørdur.

Umsitingin hevur spurt seg fyri hjá løgfrøðingi og metir hann, at kommunan kann gera sína egnu áseting hesum viðvíkjandi, men samstundis heita á Almanna- og heilsumálaráðið um at fáa sett ásetingina í dagstovnalógina, soleiðis at kommunan hevur eina lóg at vísa til, tá kravt verður eftir peningi, kommunan eigur til góðar hjá foreldrum.

Sambært § 4 stk. 2. í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt, skal landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum góðkenna upptøkureglurnar. Skotið verður tí upp, at reglan um "eftirstøðu" verður sett í upptøkureglurnar og send landsstýrismanninum til góðkenningar.

**Eftirstøða:**
Um eftirstøðan fyri at hava barn á dagstovni ella dagrøkt fer upp um 2 mánaðir, kann kommunan ella stovnurin avgera at siga plássið upp, tó soleiðis, at kommunan ella barnaverndin frammanundan hava viðgjørt spurningin, um heimild er at nýta fríplass.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin mælir til at góðkenna regluna um eftirstøðu og senda upptøku-reglurnar til landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum til góðkenningar.

**Mentamálanevndin 2. mars 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 9. mars 2005:** Gunnleyg Durhuus greiddi frá málinum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 17. mars 2005:** Einmælt samtykt.

**62/05** **200500305**

**Keyp av matr. nr. 850a, 249h og 249i, ognir hjá Conradi Skaale.**

**Tilmæli:**
Býarskipanardeildin mælir kommununi til at ogna sær omanfyri nevndu ognir grundað á:

1. Framtíðar broytt ferðsluviðurskifti á vegamótinum millum J. Patursonargøtu-Dalavegin tala til frama fyri keypi av ognini matr. nr. 850a.

2. 249h og 249i hava sera truplar atkomumøguleikar og vilja, um byggiloyvi verður givið, økja um ferðslutrupulleikarnar á J. Patursonargøtu.

3. Ognirnar kunnu verða við til at økja um møguleikarnar at ferðast í økinum til gongu. Her verður serliga hugsað um parkeringsplássið í mun til mið-býin/komandi handilsgøtu.

**Fíggjarnevndin 9. februar 2005:** Samtykt at heimila umsitingini at bjóða uppá matr. nr. 850a og 249h.

**Ískoyti:**
Fríða Patursson, adv., hevur boðað frá, at seljarin hevur góðtikið boðið uppá

kr. 100.000,00 fyri 249h og
kr. 535.000,00 fyri 850a

**Fíggjarnevndin 9. mars 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at kommunan keypir matr. nr. 249h fyri kr. 100.000,00 og matr. nr. 850a fyri kr. 535.000,00 at fíggja av konto 83.

**Býráðið 17. mars 2005:** Atkvøtt varð um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 2 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Jan Christiansen, Høgni Mikkelsen og Annika Olsen.

Ímóti atkvøddu: Bjarti Mohr og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Beate L. Samuelsen.

**63/05** **200500585**

**Umsókn frá Jógvani E. Ellefsen, adv., vegna p/f undir stovnan, um leigu av øki inni á Sundi.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Søkt verður um øki til uppseting av oljugoymslu og lagurbygningi, upp á tilsamans 6.000 m$^2$.

**Havnanevndin 7. mars 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at ganga umsóknini á møti, treytað av at øll loyvi verða fingin til vega.

**Fíggjarnevndin 9. mars 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnanevndini og at tilsøgnin er galdandi í eitt ár.

**Býráðið 17. mars 2005:** Einmælt samtykt.

**64/05** **200500201**

**Val av ferðslunevnd.**

**Býráðið 27. januar 2005:** Útsett.

**Býráðið 17. mars 2005:** Málið beint í teknisku nevnd.

**65/05** **200500067**

**Umval av limum í umboðsnevndini hjá SEV.**

Nýggjur limur skal veljast fyri Leiv Hansen, sum er komin í SEV-stýrið, og tiltakslimirnir fyri Lükku Patursson og Marin Katrinu Frýdal skulu veljast av nýggjum.

**Býráðið 17. mars 2005:** Valdur var Hans Jacob Niclassen fyri Leiv Hansen við Georg Kjærbo (Nólsoy) sum varalimi.

Sum varalimur fyri Lükku Patursson varð Eyðfinn í Búðini valdur, meðan Bjørn Patursson var valdur sum tiltakslimur fyri Marina Katrinu Frýdal.

**66/05** **200500592**

**Áheitan frá Jákupi Simonsen, dagfest 1. mars 2005, um at velja annað umboð í nevndina hjá felagnum Tórshavn.**

Á býráðsfundi 9. mars 2000 var hann valdur í nevndina fyri 2 ár, men hevur tó sitið í nevndini líka til nú.

**Býráðið 17. mars 2005:** Valdur varð Mourits Mourtisson Joensen

Mál nr. 69 og 70 vóru viðgjørd innan mál nr. 67 og 68

Kl. 19.00 var fundurin niðurlagdur
Kl. 19.35 var fundurin uppafturtikin

**67/05** **200500175**

**Val av 6 limum í nevndina fyri grunnin Aberdeen-Tórshavn**

**Býráðið 17. februar 2005:** Tikið av skrá.

**Býráðið 17. mars 2005:** Meirilutin skjýtur upp, at talið av nevndarlimum verður 7.

Minnilutin skjýtur upp, at nevndin framhaldandi verður ein 6 mannanevnd, har kommunustjórin er fastur limur. Grundgevingin er, at minnilutin heldur ikki tað er rætt at hækka talið av nevndarlimum, grunda á hækkaðar fíggjarligar útreiðslur fyri kommununa, nú talan er um ein nevndarlim meira umframt kommunustjóran.

Atkvøtt varð um meirilutatilmælið, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov

Ímóti atkvøddu: Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen, Jan Christiansen, Bjarti Mohr og Annika Olsen.

Minnilutin mótmælir, at minnilutatilmælið ikki varð tikið til atkvøðugreiðslu.

Meirilutin tilnevnir: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Katrin Dahl Jakobsen og Hildur Eyðunsdóttir.

Minnilutin tilnevnir: Bjarti Mohr, Annika Olsen og Sjúrður Olsen.

**68//05** **200500176**

**Val av 6 limum í nevndina fyri grunnin Stavanger-Tórshavn**

**Býráðið 17. februar 2005:** Tikið av skrá.

**Býráðið 17. mars 2005:** Meirilutin skjýtur upp, at talið av nevndarlimum verður 7.

Minnilutin skjýtur upp, at nevndin framhaldandi verður ein 6 mannanevnd, har kommunustjórin er fastur limur. Grundgevingin er, at minnilutin heldur ikki tað er rætt at hækka talið av nevndarlimum, grunda á hækkaðar fíggjarligar útreiðslur fyri kommununa, nú talan er um ein nevndarlim meira umframt kommunustjóran.

Atkvøtt varð um meirilutatilmælið, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov

Ímóti atkvøddu: Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen, Jan Christiansen, Bjarti Mohr og Annika Olsen.

Minnilutin mótmælir, at minnilutatilmælið ikki varð tikið til atkvøðugreiðslu.

Meirilutin tilnevnir: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Leivur Hansen.

Minnilutin tilnevnir: Jan Christiansen, Høgni Mikkelsen og Beate L. Samuelsen.

**69/05** **200500182**

**Val av limi og varalimi í nevndina fyri Listasavni Føroya.**

Sambært § 4 í viðtøkunum fyri listasavnið velur landsstýrið ein lim, sum er formaður, Tórshavnar kommuna ein, Listafelag Føroya ein og felagið Føroysk Myndlistafólk ein.

Nevndin verður vald fyri eitt 3-ára skeið.

**Býráðið 17. mars 2005:** Vald varð Hildur Eyðunsdóttir sum limur og Katrin Dahl Jakobsen sum varalimur.

**70/05** **200500680**

**Val av 5 limum í musikkskúlanevndina.**

Sambært reglugerðini fyri musikkskúlan verður stovnurin stjórnaður av eini 5-mannanevnd.

Nevndarlimirnir verða tilnevndir av Tórshavnar býráð fyri eitt býráðsvalskeið í senn.

Nevndin velur sjálv formann.

**Býráðið 17. mars 2005:** Vald vóru Halla Samuelsen, Jóannes Jakobsen, Maud Vang Hansen, Anfinn Norðfoss og Torkil Johannesen.